# Sáttmáli

**millum**

**Heilsuhjálparafelag Føroya**

**og**

**Kommunala**
**Arbeiðsgevarafelagið**

**2021**

**Innihaldsyvirlit**

§ 1. Sáttmálaøki ... 3
§ 2. samráðingarrættur ... 3
Skyldur o.a. ... 3
§ 3. Setanarbræv og starvslýsingar ... 3
Mánaðarløntir heilsu-/heimahjálparar ... 4
§ 4. Løn ... 4
§ 5 . Samsýning fyri ólagaliga arbeiðstíð ... 5
§ 6. Viðbøtur ... 6
§ 7. Skeið ... 7
§ 8. Undirvísing ... 7
§ 9. Tænastuferðir og koyring ... 7
§ 10. Frídagar. ... 8
§ 11. Frítíð ... 8
§ 12. Eftirløn ... 8
§ 13. Tilkallivakt ... 8
§ 15. Sjúka ... 9
§ 16. Eftirsitiløn ... 9
§ 17. Farloyvi ... 10
§ 18. Uppsøgn ... 10
§ 19. Lønarútgjalding ... 10
Tímaløntir heilsu-/heimahjálparar ... 10
§ 20. Løn og arbeiðstíð ... 10
§ 21. Barnsferð og sjúka. ... 11
§ 22. Uppsøgn. ... 11
§ 23. Viðbøtur ... 11
§ 24. Aðrar setanartreytir ... 11
Avtala um serstaka fríviku ... 12
Avtala um tiltøk at styrkja førleikamenning, eldrapolitikk, familjupolitikk og javnstøðu ... 13
Avtala um strategiska og skipaða førleikamenning á arbeiðsplássum ... 15
Álitisfólkaskipan fyri heilushjálparar/heimahjálparar ... 17

**§ 1. Sáttmálaøki**
Hesin sáttmálin fevnir um heilsu-/heimahjálparar, sum arbeiða á arbeiðsplássum, har Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur málsræði at áseta lønir og setanartreytir.

**§ 2. samráðingarrættur**
Samráðingarrættin hevur Heilsuhjálparafelag Føroya, ið ger sáttmála við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Stk. 2.** Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fasta Gerðarrætt.

**Skyldur o.a.**
Leiðslan hevur skyldu til at upplýsa Heilsuhjálparafelag Føroya um broytingar í arbeiðsviðurskiftum og útbúgvingarviðurskiftum og gera hesar aftaná samráðingar við felagið. Tá ið avgerðandi broytingar verða gjørdar í arbeiðsgongdini ella umsitingini á einum arbeiðsplássi, skal starvsfólkið hava boð um hetta í góðari tíð fyri at fáa høvi til at vera við í tilrættaleggingini. Krevja tílík tiltøk eftirútbúgving, skulu starvsfólkini hava høvi til at fáa neyðuga eftirútbúgving, so tey kunnu røkja hesi arbeiði.

**§ 3. Setanarbræv og starvslýsingar**
Mánaðarlønt starvsfólk fær, í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina, setanarbræv. Í setanarbrævinum skal standa:

- navn og bústaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta,
- nær setanin tekur við
- galdandi sáttmáli millum omanfyri nevndu partar at ganga eftir,
- starvsheiti,
- byrjanarløn (grundløn umframt fastar viðbøtur og/ella ískoyti),
- eftirlønargjald,
- starvsaldur og næstu broytingar í starvsaldri,
- uppsagnartíð frá arbeiðsgevara og setta,
- setanarbrotpartur, arbeiðstíð, avtala um ávísa arbeiðstíð, t.d. dag-, kvøld- og náttarbeiði,
- frítíð við løn og frítíðarískoyti,
- setanarøki og
- arbeiðsstaður/staðir í løtuni (fatar arbeiðið um fleiri arbeiðsstaðir, skal verða viðmerkt á hvørjum arbeiðsstaði umsøkjarin hevur høvuðsstarv).

Til tess at verða settur í starv sum heilsu-/heimahjálpari, skal viðkomandi vera fyltur 18 ár. Við setanina váttar heilsu-/heimahjálpari við undirskrift at halda arbeiðsreglurnar.
Arbeiðsgevarin sendir samstundis felagnum avrit av setanarskrivinum, fyri limir í felagnum.
Leys heilsu-/heimahjálparastørv skulu lýsast leys alment, á ein slíkan hátt, at almenningurin verður kunnugur við lýsingina. Hetta er eisini galdandi fyri fyribilsstørv viðm.
Hetta kann gerast við at lýsa í bløðunum, umframt á internetsíðum, ið hava stóra útbreiðslu.

**Stk. 2.** Verður nýtt starv skipað, sum higartil ikki er flokkað, verður flokkingin ásett í samráð við felagið.

**Mánaðarløntir heilsu-/heimahjálparar**

**§ 4. Løn**
Heilsu-/heimahjálparar, ið hava staðið góðkent prógv og arbeiða meira enn 15 tímar um vikuna í miðal, verða løntir sambært hjáløgdu lønartalvu. Lønin er treytað av fullari arbeiðstíð, sum er 40 tímar í miðal um vikuna.

Flokkingar:

| | |
|---|---|
| Heimahjálpari gongur stigini: | **2 til 7** |
| Heilsuhjálpari gongur stigini: | **7 til 12** |

Frá 1. oktober 2023 verður nýtt stig 13 sett inn og heimahjálparar fáa nýtt endastig 8. Tey, sum tann dagin hava verið 2 ár á stig 12, flyta á stig 13, og tey, sum tann dagin hava verið 2 ár á stig 7, flyta á stig 8.

Flokkingar:

| | |
|---|---|
| Heimahjálpari gongur stigini: | **2 til 8** |
| Heilsuhjálpari gongur stigini: | **7 til 13** |

Heimahjálparar, sum nema sær útbúgving til heilsuhjálparar, missa ikki starvsaldur.
Framflutningur til næsta lønarstig fer fram aftaná 2 ára fullan starvsaldur á sama lønarstigi.
Er heimahjálpari settur at arbeiða minst 15 tímar um vikuna í miðal um árið, verður fullur starvsaldur roknaður.
Heilsuhjálpari, sum arbeiðir 15 tímar um vikuna í miðal um árið, verður mánaðarløntur aftan á eitt ára setan.

**Stk. 2.** Arbeiðstíðin er 8 tímar um dagin. Tó eru møguleikar at gera avtalur um frávik, um arbeiðsgongdin á starvsstaðnum krevur tað. Partarnir eru samdir um, at arbeiðið skal skipast uttan brot í arbeiðstíðini, har tað letur seg gera. Tíðin, ið neyðugt er at ferðast húsanna millum, verður at roknað, sum arbeiðtíð.
Er mattíðin fastløgd, verður hon ikki roknað við í arbeiðstíðina. Er ikki møguleiki at fastleggja mattíðina, verður hon roknað sum arbeiðstíð og skal haldast, tá ið arbeiðsgongdin loyvir tí. Henda fríløtan kann vera upp til ½ tíma, og skal starvsfólkið vera til taks, um brúk er fyri tí.
Verður arbeitt 2 tímar ella meira út um vanliga arbeiðstíð, hevur starvsfólkið rætt til ½ tíma matarsteðg uttan lønarmiss.

**Stk. 3.** Mánaðarløntur heilsu-/heimahjálpari eigur løn fyri í minsta lagi tað fasta tímatalið, sum hann er settur eftir, uttan mun til, um arbeiðsgevarin ger nýtslu av heilsu-/heimahjálparanum ta ásettu tíðina.
Fær fastløntur heilsu-/heimahjálpari ikki arbeitt tað tímatalið, sum ásett er í arbeiðsætlanini av orsøkum, sum hann ikki hevur skuld í sjálvur, eigur hann kortini løn fyri tað ásetta tímatalið henda dagin.

**Stk. 4.** Arbeitt verður eftir arbeiðsætlan, sum verður løgd fyri 4 vikur í senn, har tilskilað er:

- Hvørjir dagar eru arbeiðsdagar, og hvørjir eru frídagar.
- Talið á arbeiðstímum fyri hvønn arbeiðsdagin sær.
- Veruliga tíðin, sum tað tekur hjá heilsu-/heimahjálparunum at koma úr einum heimi í annað (til gongu ella við bili) fyri hvørja ferðing sær. Har bólkarøkt er, verður hetta ikki tilskilað.

Broytingar mugu ikki fara fram tær seinastu 4 vikurnar, ið arbeiðstíðin er tilrættisløgd.
Um broytingar fara fram, skal tað bara vera undir serligum umstøðum, so sum sjúku og í samráð við starvsfólkið.

Frígonga, orsakað av uppsparing av serligum veitingum t.d. úrtíðararbeiði, sunnu- og halgidagsarbeiði og annað, skal kunngerast í arbeiðstíðini í seinasta lagi 72 tímar, áðrenn frígingið verður.
Um tilrættisløgd frígonga verður tikin aftur, skal hetta kunngerast í seinasta lagi 72 tímar, áðrenn farið verður undir arbeiðið, sum liggur beint áðrenn, farið verður undir frídagar. Um ikki er fráboðað rættstundis, skal tíðin samsýnast sum úrtíð/mist frítíð.
Um heilsu-/heimahjálpari verður boðsendur til arbeiðis, fær viðkomandi løn fyri minst 3 tímar. Hetta er galdandi fyri dagar, sum ikki eru fastlagdir sum 0-dagar.

**Stk. 5.** Umlagdir tímar
Verður neyðugt at broyta vanligu arbeiðstíðina (tímalønt undantikin) í mun til ta upprunaligu, skal fráboðast við minst 72 tíma freist. Verður henda freist ikki hildin, skal heilsu-/heimahjálpari fáa viðbót á 23,25 kr. um tíman. Broytt arbeiðstíð er at skilja sum tíð, ið fellur uttan fyri ásettu arbeiðstíðina, men ikki er at rokna sum úrtíð.

**Stk. 6.** Varningsgjald
Um heilsu-/heimahjálpari skal arbeiða yvir, skal vikomandi hava boð um tað dagin fyri í arbeiðstíðini. Verður ikki fráboðað rættstundis, skal viðkomandi hava varningsgjald á 25,77 kr., um úrtíðararbeiðið er meira enn ein tíma.

**Stk. 7.** Frídagar/døgn
Heilsu- /heimahjálpari hevur rætt til eitt frítíðarskeið um vikuna. Hesa tíðina kann tilkallivakt/samdøgursvakt ikki áleggjast starvsfólkunum.
Arbeiðsætlan eigur at verða løgd soleiðis, at niðanfyri standandi krøv í samband við frítíðarskeiðið verða fylgd:

1. Frítíðarskeiðið skal verða minst 64 tímar út í eitt. Tó verður tað roknað sum givið frítíðarskeið, um frítíðarskeiðið bert er millum 55 og 64 tímar.
2. Um frítíðarskeiðið ikki hevur áðurnevndu longd (1) skulu ístaðin gevast tvey (2) frítíðarsskeið.

Hesi frítíðarskeið skulu vera minst 40 tímar út í eitt. Tó verða tey roknað sum givin frítíðarskeið, um skeiðið bert hevur verið 35 – 40 tímar. Verður frítíðarskeiðið tikið aftur við styttri fráboðan enn 4 vikur, verður samsýning givin sum úrtíð.

**Stk. 8.** Tá 4 vikurs skeiðið samb. stk. 4 er farið, verður uppgjørt, hvussu nógv heilsu-/heimahjálpari hevur arbeitt. Hevur fastløntur heilsu-/heimahjálpari arbeitt meira enn ásetta tímatalið, verður meirarbeiðið lønt við tímaløn, sum er 1/2080 av árslønini. Harafturat verður latin samsýning fyri ólagaliga arbeiðstíð.
Um heilsu-/heimahjálpari í 6 samanhangandi vikur hevur arbeitt meira enn 40 tíma viku í miðal, verður goldin úrtíðarløn, sum er 50% eyka av vanligu lønini. Heilsu-/heimahjálpari avger sjálvur, um hann vil hava úrtíðina útgoldna í løn ella avspákaða. Boðað eigur at verða frá avspáking, áðrenn arbeiðsætlan verður løgd. Avspáking verður løgd í samráð við leiðaran. Meirtímar er arbeiði ímillum setanarbrøk og fulla tíð.

**§ 5 . Samsýning fyri ólagaliga arbeiðstíð**
**Stk. 1.** Fyri arbeiði í tíðarskeiðinum kl. 17.00 - 23.00 verður latin viðbót svarandi til 23% av tímalønini í dagtænastuni.
**Stk. 2.** Fyri arbeiði í tíðarskeiðinum kl. 23.00 - kl. 06.00, tó mánanátt frá kl. 00.00 - 06.00, verður latin viðbót svarandi til 35% av tímalønini í dagtænastuni.
Harumframt verður fyri arbeiði í tíðarskeiðinum sunnunátt kl. 23.00 til 06.00 goldin sunnudagsviðbót afturat náttarviðbótini, og fyri arbeiði í tíðarskeiðnum frá kl. 00.00 - 06.00 mánanátt verður leygardagsviðbót goldin afturat náttarviðbótini.
**Stk. 3.** Fyri arbeiði leygardagar millum kl. 06.00 - 24.00 verður latin viðbót svarandi til 27,5% av tímalønini í dagtænastuni.

**Stk. 4.** Fyri arbeiði sunnu- og halgidagar og serstakar frídagar verður latin 30 minuttir eyka fyri hvønn arbeiðstíma. Heilsu-/heimahjálpari kann í samráð við leiðsluna avspáka hesar tímar.
**Stk. 5.** Tá ið heilsu-/heimahjálpari er til hjálpar í neyðsynd, eitt nú við sjúkrabili ella tyrlu, fær hann sum eyka samsýning kr. 750.
Fyri at gera lík í stand og leggja í kistu:
Frá kl.07.00 til 23.00 – 140 kr. hvørja ferð.
Frá kl.23.00 til 07.00 – 250 kr. hvørja ferð.
**Stk. 6.** Minsta ómaksløn fyri at verða boðsendur á nátt (millum kl. 23.00 og 06.00) er tríggjar tímar umframt eykagjaldið.
**Stk. 7.** Heilsu-/heimahjálpari, sum fyribils røkir hægri starv í minst eina viku, eigur í hesum tíðarskeiði somu løn, sum viðkomandi hevði fingið, um viðkomandi var sett í hetta hægra starvið.
**Stk. 8.** Fyri hvørjar fullar 40 tímar sum kvøld- ella náttararbeiði eigur starvsfólk frí í 3 tímar.
Kvøld- ella náttararbeiði er arbeiði, sum er byrjað kl. 14 ella seinni, og sum endar seinni enn kl. 17.
Hesar reglur galda fyri allar yrka-, sunnu- og halgidagar, men ikki fyri yvirtíð, tilkalli- og samdøgursvaktir.
Henda regla umfatar ikki tímalønt, av tí at tey fáa fulla samsýning í tímaløn fyri kvøld- og náttararbeiði.
**Stk. 9.** Arbeiðið skal so vítt gjørligt skipast uttan brot í arbeiðstíðini. Har tað ikki letur seg gera, at skipa arbeiðið uttan brot í arbeiðstíðini, verða tímarnir sum liggja í vanligari tíð yrkadagar samsýntir smb. § 5, stk.1.

**§ 6. Viðbøtur**
Starvsfólk fáa ókeypis tænastubúna. Har hettar ikki er gjørligt, verður latin árlig viðbót kr. 1.920,00
Er ókeypis vask á arbeiðsstaðnum, verður latin árlig viðbót kr.840,00.
Fáa starvsfólk ókeypis tænastubúna, men ikki ókeypis vask, so verður latin árlig viðbót kr. 1.080,00

**Stk. 2.** Bólkaleiðari:
Verður starvsfólk sett sum bólkaleiðari, verður veitt viðbót sum er kr. 1.250 fyri smærri økini og kr. 2.000 fyri stóru økini. Hon verður veitt fyri ábyrgd og vansar, sum fylgja við starvinum, so sum at svara telefon eisini heima og er ikki samsvarandi setanarbrøkinum.

**Stk. 3.** Førleikaviðbót kann latast fyri eftirútbúgving. Hesar viðbøtur eru førleikaviðbøtur og eru knýttar at starvinum. Fyri at kunna fáa førleikaviðbót, skal eftirútbúgvingin verða kravd og verða frá góðkendum útbúgvingarstað. Sjálvt um starvsfólk hava tikið meira enn eina eftirútbúgving, so verður bert ein viðbót latin. Er starvið parttíðarstarv verður viðbótin samsvarandi setanarbrøkinum.
Førleikaviðbótin sambært § 6, stk. 3 gevur rætt til eftirløn.
Galdandi frá 1. oktober 2017.

Eftirútbúgving 120 tímar: 750,-kr. Eftirútbúgving 160 tímar: 1.000,-kr. Eftirútbúgving 200 tímar: 1.250,-kr.

**Stk. 4.** Heilsu-/heimahjálpari, sum hava lokið prógv sum praktikkvegleiðarar, fáa kr. 1.500 um mánaðin í viðbót ta tíðarskeiðið tey virka sum praktikkvegleiðarar. Er sum undantak neyðugt at nýta praktikkvegleiðara, sum ikki hevur lokið prógv, er viðbótin kr. 1.000,- um mánaðin.

**Stk. 5.** Starvsfólk, sum arbeiða á stongdari deild, fáa eina vandaviðbót áljóðandi 700 kr. um mánaðin. Henda viðbót kann eisini latast, tá ein deild av trygdarávum verður stongd í meira enn ein mánað út í eitt. Gjaldið verður tá kr. 25,00 fyri hvørja planlagda vakt, ið er arbeidd við góðkenning deildarleiðarans. Hetta gjaldið verður bert latið til starvsfólk, sum ikki frammanundan fáa nevndu viðbót.

*Hjá parttíðarsettum verður lønarbrotparturin niðurskrivaður í mun til arbeiðstíðina.*

*Serligar reglur eru fyri tímalønt starvsfólk, smb. § 20 um tímalønt arbeiði.*

**Stk. 6.** Tá ið starvsfólk luttaka á summarfrítíðarlegu við búfólkum/sjúklingum verður veitt eitt legugjald upp á kr. 275 fyri yrkadagar og kr. 550 fyri sunnu- og halgidagar.
Tíðin verður uppgjørd soleiðis: Undir hálvt samdøgur er hálvt gjald og yvir hálvt samdøgur er fult gjald. Gjaldið hoyrir til tað samdøgrið, har flest tímar liggja.
Løn verður latin, sum fyri vanligan arbeiðsdag, tó í mesta lagi upp til 8 tímar. Starvsfólk, sum vanliga arbeiða niðursetta tíð fáa eisini 8 tímar fyri legudag, tá legudagurin er 8 tímar.
Treytin fyri at nýta hesa avtalu er, at talan er um eina frammanundan avtalaða avmarkaða tíð, og veruliga er talan um leguhald.

**§ 7. Skeið**
Tá starvsfólk søkir um at koma á eftirútbúgvingarskeið fyri at halda útbúgvingina við líka, skal umsóknin viðgerðast við vælvild. Allar útreiðslur í hesum sambandi verða goldnar av arbeiðsgevaranum.
**Stk. 2.** Fyri skeið, sum leiðslan áleggur starvsfólkunum at luttaka á, verður hvør einstakur skeiðdagur roknaður sum 1 vanligur arbeiðsdagur tó í mesta lagi 8 tímar. Um skeið liggur á degi, har starvsfólkið longu hevur arbeitt tímanormin, verður skeiðtíðin tald við í skyldugu arbeiðstíðina tó við hægst 4 eykatímum útyvir dagtímanormin. Um skeið liggur í vikuskifti ella á føstum frídegi eftir § 10, stk. 1 verður latin tímasamsýning fyri ólagaligu tíðina sambært § 10, stk. 2.
Skeiðtíðin verður harumframt tald við í skyldugu arbeiðstíðina tó við í mesta lagi 8 tímum hvønn skeiðdagin.
**Stk. 3.** Fyri skeið, sum liggja uttan fyri vanligu arbeiðstíðina, og sum eru ikki áløgd, kann stovnurin lata aðra frítíð tíma fyri tíma í staðin fyri tíðina, ið er nýtt til skeiðluttøku.
**Stk. 4.** Samsýnt verður fyri ferðatíðina til skeiðsstaðið (uttanbíggja), um talan er um ferðing sjóvegis, ið varðar longri enn ein tíma. Samsýnt verður ikki, um ferðatíðin ikki er longri enn ferðatíðin vanliga er frá heimi til vanliga arbeiðsstaðin. Samsýnt verður í mesta lagi fyri 4 arbeiðstímar. Ferðing í bili verður roknað í skeiðstíðina.
**Stk. 5.** Ásetingarnar í stk. 2 - 4 kunnu við avtalu millum starvsfólk og stovnin frávíkjast, men ger tílík avtala, at stovnurin verður stillaður verri arbeiðsliga ella kostnaðarliga, skal Kommunala Arbeiðsgevarafelagið góðkenna hana.

**§ 8. Undirvísing**
Heilsu-/heimahjálparir hava rætt til serliga løn fyri undirvísing og fyrireiking til undirvísing eftir hesum reglum:
1) Liggur fyrireiking og frálæra í arbeiðstíðini, fæst einki endurgjald.
2) Liggur frálæra í vanligari arbeiðstíð, og fyrireiking uttan fyri arbeiðstíð, verður endurgoldin hálv tímaløn fyri ta tíð, frálæran varir.
3) Liggur frálæra eftir arbeiðstíð, verður endurgoldið fyri teir tímar, frálæran varir.
**Stk. 2.** Goldin verður tímaløn 215,28 kr. umframt 12 % í frítíðarløn.

**§ 9. Tænastuferðir og koyring**
Dag- og tímapeningur undir tænastuferð og endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum verður sum fyri tænastumenn landsins, tó soleiðis, at avtalað er:

1. Samsýning verður goldin fyri koyring við egnum bili uttan mun til, um koyringin fer fram innan ella uttan fyri kommununa, har viðkomandi heilsu-/heimahjálpari býr.
2. Tó verður ikki goldin samsýning fyri koyring frá bústaðnum hjá heilsu-/heimahjálparinum til fyrsta stað tær møta, tað veri seg bólkahøli ella heim hjá brúkara, og frá seinasta heimi, sum

heilsu-/heimahjálparin skal vitja, og til húsar aftur uttan so, at talan er um heim, sum liggur uttan fyri núverandi arbeiðsøki hjá viðkomandi heilsu-/heimahjálpara.

3. Um broytingar verða gjørdar í verandi arbeiðsøkjum hjá heilsu-/heimahjálparum, binda partanir seg til at taka uppaftur spurningin um koyring frá húsum og heimaftur.
4. Tá steðgur er í arbeiðstíðini, verður eisini goldin samsýning fyri koyring til og frá búðstaðnum hjá heilsu-/heimahjálparanum.
5. Henda avtala er eitt lið í arbeiðsætlanini.

**§ 10. Frídagar.**
Umframt sunnudagar eru at rokna sum fastir frídagar:
Nýggjársaftan, nýggjársdagur, skírisdagur, langifríggjadagur, páskaaftan, 2. páskadagur, flaggdagur, dýribiðidagur, Kristi himmalferðadagur, hvítusunnuaftan, 2. hvítusunnudagur, ólavsøkudagur, jólaaftan, 1. jóladagur, 2. jóladagur.
Sum hálvir frídagar eru at rokna:
Grundlógardagur aftaná kl. 12, ólavsøkuaftan aftaná kl. 12.
**Stk. 2.** Verður arbeitt nevndu frídagar, verður samsvarandi frítíð latin annan dag.
**Stk. 3**. Fellur ein frídagur eftir § 10 á ein dag, sum er frídagur smb. arbeiðsætlan, verður annar frídagur latin í staðin.
**Stk. 4.** Starvsfólk hava harumframt rætt til serstakar frídagar eftir avtaluni um serstaka fríviku.

**§ 11. Frítíð**
Fyri frítíð eru reglurnar í frítíðarlógini galdandi.
Parttíðarsett, sum arbeiða meira enn ásettu arbeiðstíðina fáa vanliga frítíðarløn fyri lønina, tey vinna fyri hetta meirarbeiði.
Starvsfólk fáa 12 % í feriuløn av øllum útgoldnum viðbótum og av úrtíðarløn í undanfarna innvinningarári.
Um heilsu-/heimahjálpari er óarbeiðsførur, tá ið frítíðin byrjar, verður frítíðin flutt.
**Stk. 2.** Sjúkradagar í frítíð verða vanliga viðroknaðir sum frígongudagar. Tó kunnu eftir umsókn í serligum førum, har sjúka forðar fyri nýtslu av frítíðini á rímiligan hátt, slíkir sjúkradagar koma undir reglurnar fyri sjúku, og nýggir frídagar verða givnir.
Um starvsfólk er óarbeiðsført, tá frítíðin byrjar, verða tó altíð latnir eyka frídagar. Somu reglur verða galdandi í sambandi við sjúku undir avspáking.

**§ 12. Eftirløn**
Fyri heilsu-/heimahjálparar, ið settir eru eftir sáttmála millum Heilsuhjálparafelag Føroya og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, skal verða rindað eftirlønargjald 15% av løn sambært setanarbrøki og fyri meirtímar upp til fulla tíð (tó ikki fyri viðbøtur o.l.).
Arbeiðsgevarin rindar eftirlønargjaldið.
**Stk. 2**. Fyri tímaløntar heilsu-/heimahjálparar, ið arbeiða færri enn 59 tímar um mánaðin, rindar arbeiðsgevarin bundna eftirlønargjaldið, ið er ásett í § 2, stk.1 í eftirlønarlógini (ll. nr. 49/2013).
**Stk. 3**. Heilsu-/heimahjálparar, sum eru føddir áðrenn 01.01.1954, avgera sjálvir um eftirlønargjaldið skal flytast í eina eftirlønarskipan ella útgjaldast teimum sum løn.

**§ 13. Tilkallivakt**
Heilsu-/heimahjálparum kann verða álagt hesar tilkallivaktir: Vakt 1. Tilkallivakt frá heimi.
Vakt 2. Tilkallivakt frá vaktstovu.
Heilsu-/heimahjálpari hevur skyldu at møta beinanvegin, tá ið tilkallað verður. Tilkallivakt skal ikki verða skipað sum framhald av einari bundnari vakt.

Undir tilkallivakt hevur heilsu-/heimahjálpari rætt til flutning/hýruvogn eftir skjalprógvi til og frá arbeiðsstaðnum við tilkalling.
Verður egið akfar nýtt, verður viðbót latin, ið svarar til ½ hýruvognsgjald. Galdandi fyri alla vaktina.
**Stk. 2.** Ein tilkallivakt er partur av tí vanligu vikuarbeiðstíðini samb. grein 4. stk. 1, við hesum virðum fyri hvønn tíma:
Vakt 1: 1/3 tíma (heima) Vakt 2: 3/4 tíma (vakstova)
Verður tilkallivaktin ikki roknað við í tí vanligu vikuarbeiðstíðina, verður hon roknað sum yvirtíðararbeiði. Verður eykatilkallivakt álagt, skal hon umroknast til vanligar tímar og samsýnast sum yvirtíð.
**Stk. 3.** Fyri ta tíð, roknað frá boðsending, tá ið virkið arbeiði verður gjørt undir tilkallivakt, verður samsýnt við yvirtíðarløn svarandi til tíma fyri tíma, harafturat eru viðbøturnar í grein 5. stk. 1-6 eisini galdandi.
Hvørt uppkall telur minst 1 tíma arbeiði. Boðsending verður lønt fyri hvønn byrjaðan tíma við virknum arbeiði. Fyri fleiri boðsendingar í sama tíma, verður tó bert samsýnt fyri ein tíma.
**Stk. 4.** Heilsu-/heimahjálpari, sum hevur tilkallivakt 1, fær undir tilkallivaktini fartelefon frá arbeiðsgevaranum.

**§ 14 Barnsburðarfarloyvi og ættleiðingarfarloyvi**
Heilsu-/heimahjálpari, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.
**Stk. 2.** Heilsu-/heimahjálparin hevur rætt til barsilsfarloyvi við løn 4 vikur undan mettari føðing og í 24 vikur eftir føðing, t.e. 28 vikur tilsamans.
**Stk. 3.** Prógvar heilsu-/heimahjálpari við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør 4 vikur ella fyrr undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og heilsu-/heimahjálpari hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2.
**Stk. 4.** Umframt nevndu sømdir kann heilsu-/heimahjálpari fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.
**Stk. 5.** Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.
**Stk. 6.** Heilsu-/heimahjálparar, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.
**Stk. 7.** Umframt farloyvið nevnt í stk. 2-6, hevur heilsu-/heimahjálpari rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.

**§ 15. Sjúka**
Tá talan er um sjúku hjá heilsu-/heimahjálpara verður víst til ásetingarnar í § 5 í starvsmannalógini.
**Viðmerking:** Fyri tey ið hava øðrvísi faktiskt tímatal enn setanarbrøkurin, verður løn undir sjúku ongantíð minni enn miðaltímatalið fyri 6 teir seinastu mánaðirnar.
**Stk. 2.** Heilsu-/heimahjálparar hava rætt til frí við løn, tá barn/børn teirra eru sjúk, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi tilsamans 10 dagar árliga. Hava tey meira enn 2 børn undir 10 ár, kunnu tey fáa frí upp til 20 dagar.

**§ 16. Eftirsitiløn**
Um heilsu-/heimahjálpari doyr, meðan hann er í starvi, eigur eftirsitandi hjúnafelagi ella børn undir 18

ár, sum hann hevur skyldu at uppihalda, rætt til eftirsitiløn í mun til uppsagnartíðina, minst tríggjar mánaðir, tó hægst 6 mánaðir.
**Stk. 2.** Eftirsitiløn er tann løn, viðkomandi hevði. Lønin í mánaðinum, tá starvsfólkið doyði, verður ikki roknað upp í eftirsitilønina.

**§ 17. Farloyvi**
Heilsu-/heimahjálpara kann verða givið farloyvi uttan løn, har tað ikki stríðir ímóti áhugamálum arbeiðsgevarans. Farloyvi kann verða givið í upp til 2 ár hvørja ferð, tó í mesta lagi 4 ár, og hevur arbeiðsgevarin skyldu til at hava starv til viðkomandi, tá farloyvið er av. Tó skal heilsu-/heimahjálpari, ið hevur starvast longur enn 5 ár, so langt, tað ber til, altíð hava rætt til í minsta lagi 1 ára farloyvi.

**§ 18. Uppsøgn**
Mánaðarløntur heilsu-/heimahjálpari kann siga starv sítt upp við 1 mánað freist til tann 1. í einum mánaði. Arbeiðsgevarin kann siga upp mánaðarløntan heilsu-/heimahjálpara við 1 mánað freist til tann 1. í einum mánaði teir fyrstu 6 mánaðirnar, viðkomandi er í starvi. Freistin verður longd til 3 mánaðir frá einum 1. í mánaðinum at rokna, um viðkomandi uttan slit hevur verið mánaðarløntur heilsu-/heimahjálpari í meira enn 6 mánaðir. Uppsagnarfreistin verður longd við einum mánaði fyri hvørji 3 ár, mánaðarløntur heilsu-/heimahjálpari hevur verið í starvi, tó hægst 6 mánaðir. Um mánaðarløntur heilsu-/heimahjálpari hevur framt álvarsligt brot á skyldur sínar, kann arbeiðsgevarin siga honum upp beinanvegin.
**Stk. 2.** Ætlar arbeiðsgevari at siga starvsfólk úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið felagnum og starvsfólkinum til ummælis við minst 14 daga freist, um ikki eymir upplýsingar sambært § 27 í fyrisitingarlógini eru í tí (í tí føri fær Heilsuhjálparafelag Føroya samstundis fráboðan um, at ætlanarskriv er sent starvsfólkinum).Millum eymir upplýsingar sambært § 27 í fyrisitingarlógini eru - ættarslag, trúgv, húðalitur, heilsuviðurskifti, misnýtsla av njótingerevnum, og annað um politisk, felagsskaplig, kynslig og revsiverd viðurskifti o.a.
**Stk. 3.** Um so er, at Heilsuhjálparafelag Føroya metir ætlaðu uppsøgnina at vera ógrundaða, kann felagið innan eina viku krevja fund við setanarmyndugleikan. Um so er, at starvsfólk eftir arbeiðsgevarans meting ikki røkir tænastuskyldur sínar, eigur starvsfólkið í fyrstu syftu at fáa eina "munnliga" ávaring (sum er skrivlig). Tá ið ávaring verður kunngjørd, skal álitisfólkið á staðnum vera hjástatt.
Eftir hesa munnligu ávaring hevur viðkomandi rætt til at fáa at vita orsøkina til ávaringina og fær frá tí tíðarskeiði eina freist, áðrenn ein skrivlig ávaring kann verða givin viðkomandi og send felagnum við nágreiniligari grundgeving.
Tá ið uppsøgn verður givin skal hon sendast viðkomandi skrivliga.
Reglurnar um ávaringartilgongd eru ikki galdandi, um starvsfólk hevur framt grovt misbrot í tænastuni. Áðrenn uppsøgn uttan umsókn verður givin, skal arbeiðsgevarin senda felagnum fráboðan.

**§ 19. Lønarútgjalding**
Mánaðarløn verður goldin afturút. Lønin verður goldin umleið 25. í mánaðinum.

**Tímaløntir heilsu-/heimahjálparar**

**§ 20. Løn og arbeiðstíð**
Heilsu-/heimahjálpari, ið arbeiðir minni enn 15 tímar um vikuna í miðal, fær tímaløn, ið er 1/2080 av galdandi ársløn sambært hjáløgdu lønartalvu. Lønaraldur verður latin í lutfalli til arbeiddu tíðina.
Eftir at heilsu-/heimahjálpari, hevur verið í starvi uttan slit í eitt ár, verður lønaraldur roknaður. Lønaraldur verður roknaður, um hann kann prógva minst 59 tíma arbeiði um mánaðin.

**Stk. 2.** Um tímaløntur heilsu-/heimahjálpari hevur arbeitt meira enn 40 tíma viku, verður goldin úrtíðarløn, sum er 50 % eyka av vanligu lønini.

**§ 21. Barnsferð og sjúka.**
Fyri barnsferð og sjúku eru reglurnar í lógini um barsilsskipan og í dagpeningalógini galdandi.

**§ 22. Uppsøgn.**
Heilsu-/heimahjálpari, sum settur er at arbeiða sum tímaløntur, hevur tríggja daga freist at siga seg úr starvi. Arbeiðsgevari kann uppsiga heilsu-/heimahjálpara við niðanfyri standandi freistum:
1., 2. og 3. mánaðin er uppsagnartíðin 7 dagar.
4., 5. og 6. mánaðin er uppsagnartíðin 14 dagar.
7., 8. og 9. mánaðin er uppsagnartíðin 21 dagar.
10., 11. og 12. mánaðin er uppsagnartíðin 28 dagar. Eftir 1 ár í starvi er uppsagnartíðin 30 dagar.
Heilsu-/heimahjálpari, sum hevur framt brot sambært § 18, kann tó sigast úr starvi beinanvegin.

**§ 23. Viðbøtur**
Viðbót fyri klæði er sum ásett í lønartalvuni.

**§ 24. Aðrar setanartreytir**
Fyri tímaløntar heilsu-/heimahjálparar galda annars reglurnar í:
- **§ 1**
- **§ 2**
- **§ 3**
- **§ 4**, stk. 1, stk. 2, stk. 4 og stk. 7
- **§ 5**, stk. 1 – 6 og stk. 9
- **§ 8**
- **§ 9**
- **§ 10**, stk. 1 og 3
- **§ 11**
- **§ 12**, treytað av, at heilsu-/heimahjálpari arbeiðir 59 tímar um mánaðin.

**§ 25 Gildiskoma og uppsøgn**
Hesin sáttmálin er galdandi frá 1. oktober 2021 til 1. oktober 2024, og kunnu partarnir siga hann upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober 2024.

Tórshavn, tann 24. mars 2022

| | |
|---|---|
| Heilsuhjálparafelag Føroya | Kommunala Arbeiðsgevarafelagið |

**Avtala um serstaka fríviku**

Øki
**§ 1.** Avtalan er galdandi fyri mánaðarlønt starvsfólk.
*Stk. 2.* Avtalan er eisini galdandi fyri tímalønt, sum eru í starvi í meiri enn 3 mánaðir.

Hvussu frívikan verður innvunnin og hildin
**§ 2.** Aftur at frítíðini eftir frítíðarlógini, vinnur starvsfólk eina serstaka fríviku um árið. Vunnir verða 0,42 serstakar frídagar við løn fyri hvønn mánað í starvi (5 daga vika). Serstøku frídagarnir verða vunnir samsvarandi setanarbrøkinum.
*Stk. 2.* Serstaka frívikan verður innvunnin og hildin í frítíðarárinum, á sama hátt sum frítíð eftir frítíðarlógini.

**§ 3.** Setanarmyndugleikin og tann setti avtala, nær í frítíðarárinum serstaka frívikan verður hildin. Hon verður løgd í samráð við starvsfólkið, tá ið arbeiðsgongdin loyvir tí. Starvsfólkið skal boða frá so tíðliga sum til ber, nær ætlanin er at halda frívikuna.
*Stk. 2* Frídagarnir kunnu verða hildnir hvør sær, eisini sum hálvir dagar.

**§ 4.** Setanarmyndugleikin og starvsfólkið kunnu í staðin avtala, áðrenn frítíðarári byrjar, at serstaka frívikan ella partur av henni verður ikki hildin, men útgoldin, tá ið frítíðarárið er av, jb. § 7. Er semja um tað, kann slík avtala eisini verða gjørd í frítíðarárinum.

**§ 5.** Setanarmyndugleikin og starvsfólkið kunnu eisini avtala, at serstaka frívikan ella partur av henni, sum er ikki hildin, tá ið frítíðarárið er av, verður flutt at halda í seinri frítíðarári.
*Stk. 2.* Avtalan skal vera skrivlig og avtalað skal eisini verða, nær fluttu dagarnir skulu verða hildnir.
*Stk. 3.* Verður avtala ikki gjørd sambært stk. 1, verða serstøku frídagarnir útgoldnir, tá ið frítíðarárið er av, jb. § 7.

**§ 6.** Fer starvsfólk úr starvi, og hevur ikki hildið serligu frívikuna ella part av henni, verður hon útgoldin, jb. §7.

**§ 7.** Útgjaldið fyri serstakan frídag er ½% av vunnari løn í undanfarna innvinningarári.
Í útrokningini verður ikki tald við løn, sum er útgoldin í frítíðini, veitt frítíðarløn ella útgoldið frítíðarískoyti.

Gildiskoma og skiftisreglur
**§ 8.** Avtalan hevur gildi frá 1. apríl 2006.

**§ 9.** Fer starvsfólk úr starvi í innvinningarárinum 2006/2007, soleiðis at tey ikki eru í starvið tann 1. apríl 2007, hava tey ikki rætt til serstøku frídagarnar.
*Stk. 2.* Starvsfólk, sum er í starvi alt innvinningarárið 2006/2007, tvs. frá 1. apríl 2006 til 31. mars 2007, hevur rætt til 5 serstakar frídagar í frítíðarárinum, sum byrjar 2. mai 2007. Hevur starvsfólkið verið í starvi minni enn alt innvinningarárið, verða serligu frídagarnir lækkaðir samsvarandi.

**Avtala um tiltøk at styrkja førleikamenning, eldrapolitikk, familjupolitikk og javnstøðu**

**1.** Inngangur
Tað er týdningarmikið, at starvsfólkið hevur møguleika fyri persónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit at sambandið millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um, at styrkja teir møguleikar, ið arbeiðsplássini hava, tá ið teir evna sín starvsfólkapolitikk á hesum økjum:

- Førleikamenning
- Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á arbeiðsplássunum
- Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á arbeiðsplássunum
- Javnstøða

Harafturat eiga rættindi hjá starvsfólkum at verða vird, um virksemi hjá kommununum verður lagt til onnur at reka.

**2.** Førleikamenning
Leiðslur og starvsfólk eru týdningarmesta tilfeingið á arbeiðsplássunum. Tað er tað arbeiði, sum starvsfólkini í tænastuni inna, sum er avgerandi fyri, um úrslitini verða góð. Tað er umráðandi framhaldandi at menna starvsfólkini og ein fyritreyt fyri, at arbeiðsplássini mennast.
Partarnir eru tí samdir um, at:

- miðvís og dagførd eftir- og víðariútbúgving av starvsfólkinum er ein fyritreyt fyri virkisfýsnum arbeiðsplássum við høgum tænastustigi.
- hvørt arbeiðspláss sær skal virka fyri, at starvsfólkinum stendur í boði at kunna menna sín førleika bæði gjøgnum sítt dagliga yrki og við eftir- og víðariútbúgving. Til tess at røkka hesum endamáli, eigur hvørt arbeiðspláss at seta sær miðvís menningarmál.
- endamálið við hesi avtalu er at geva starvsfólkinum umstøður at menna seg sjálvt og síðani møguleikar, at átaka sær virknari leiklut at mynda virki á arbeiðsplássinum. Harumframt ber til hjá leiðsluni at menna tænastuførleikan.
- starvsfólk og leiðsla hava í felag ábyrgdina av førleikamenningini. Uppgávan hjá arbeiðsplássinum er at bera so í bandi, at starvsfólkini altíð eru skikkað til uppgávuna.
- Sáttmálapartarnir seta ein arbeiðsbólk, sum í sáttmálaskeiðnum skal tilevna eina vegleiðing um eina skipaða útbúgvingarætlan til starvsfólkini.

**3.** Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á arbeiðsplássum
Fyri at varðveita eldri starvsfólk og fakligu vitan teirra á arbeiðsmarknaðinum, eru partarnir samdir um, at sum liður í eldrapolitikkinum á einstaka arbeiðsplássinum eigur at bera til at gera skipanir til starvsfólk, sum eru 60 ár og eldri – um so er, at tey sjálvi vilja tað, og umstøðurnar á arbeiðsplássinum annars eru til tess – at leggja síni eldru ár á arbeiðsmarknaðinum soleiðis til rættis, at tey fáa eina liðiliga tillagingarskipan, áðrenn tey fara úr starvi.
Tá ið arbeiðspláss evna sín eldrapolitikk, kunnu tey sum part í hesum gera sjálvbodnar skipanir, í hesum karmi:

Niðursett tíð
Hesar treytir skulu verða loknar, so at starvsfólk skal kunna koma undir skipanina:
a) vera fylt 60 ár
b) hava starvast innan økið seinastu 10 árini
c) arbeiðstíðin skal vera minst 20 tímar um vikuna, eftir tað, at hon er niðursett

Starvsfólk kann fara upp í ¼ niður í starvstíð við lutfalsliga at fara niður í løn.

Arbeiðsplássið kann í hesum tíðarskeiðinum gjalda eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin var ikki sett niður.

Lægri starv
Arbeiðsplássið kann eftir umsókn játta starvsfólki, ið hevur fylt 55 ár, at fara í annað lægri starv, um so er,
at starvsfólkið seinastu 10 árini hevur starvast fulla tíð innan økið í einum starvi við leiðsluábyrgd ella í øðrum serliga krevjandi starvi.
Lønin verður tá samsvarandi lægra starvinum, men starvsfólkið fær framvegis heilt ella lutvíst eftirlønargjaldið í hægra starvinum, fyri eitt tíðarskeið, sum í mesta lagi má vera 7 ár.
Arbeiðsplássið kann veita eitt ikki eftirlønargevandi ískoyti, sum í mesta lagi kann vera munurin millum lønina í lægra flokkinum og lønina í hægra flokkinum. Ískoytið kann í mesta lagi verða veitt í 3 ár.

**4.** Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á arbeiðsplássum
Tá ið lagt verður til rættis, eiga bæði starvsfólk og leiðsla at vísa lagaligheit og smidleika, fyri at betri samanhangur kann verða millum familjulív og arbeiðslív.
Í teimum førum, tá ið børn verða innløgd á sjúkrahús, og lækni sigur tað vera neyðugt, at annað av foreldrunum verður innlagt við, kann starvsfólkið, loyva arbeiðsumstøðurnar tí, brúka dagarar, ið starvsfólkið eigur til frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, samanhangandi longur enn 2 dagar.

**5.** Javnstøða
Lønarskipanin eigur at verða so mikið greið, at hon gevur betri trygd fyri, at javnstøða er millum kynini, tá ið lønin verður ásett.

**6.** Umleggja virksemi
Um so er, at virksemi verður yvirtikið av øðrum at reka, eiga tær avtalur, rættindi og skyldur, arbeiðsgevarin hevur mótvegis starvsfólkunum, tá ið umskipanin fer fram, óskerdar at verða førdar yvir á tann, sum yvirtekur virksemið.

**Avtala um strategiska og skipaða førleikamenning á arbeiðsplássum**

**§ 1**. Inngangur
Skulu uppgávurnar á arbeiðsplássum verða røktar á munadyggan hátt við neyðugari dygd og framhaldandi menning, er sera týðandi, at førleikarnir hjá starvsfólkunum verða áhaldandi røktir og mentir.
**Stk. 2.** Partarnir halda tað vera avgerandi, at starvsfólk fáa møguleika at menna sín førleika, bæði í dagliga arbeiðnum og við eftirútbúgving og víðari útbúging. Fyri at fremja førleikamenningina eiga leiðslur og starvsfólk í felag at hava sum mál at stovna felags læruumhvørvi og at leggja til rættis eina smidliga tilgongd fyri førleikamenningini. Partarnir eru samdir um, at strategisk mál fyri menningini skulu verða gjørd fyri øll starvsfólk.

**§ 2**. Øki
Avtalan er galdandi fyri starvsfólk, sum eru fevnd av sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og felag, ið hevur undirskrivað hesa avtalu.

**§ 3**. Endamál
Endamálið við avtaluni er at binda leiðslu og starvsfólk til at leggja stóran dent á førleikamenningina, og báðir partar hava ábyrgd av at tryggja, at førleikamenningin styrkist. Hetta skal nøkta tørvin á fakligari menning hjá einstaka arbeiðsplássinum og einstaka starvsfólkinum.

**§ 4**. Menningarmál
Fyri hvørt einstakt starvsfólk á øllum arbeiðsplássum verður gjørd ein skipað førleikamenningarætlan, ið skal taka atlit at málunum hjá tí einstaka arbeiðsplássinum.
**Stk. 2.** Árliga er samrøða millum leiðsluna og starvsfólkið, har ítøkilig menningarmál fyri einstaka starvsfólkið verða fest á blað í semju við starvsfólkið. Í starvsfólkasamrøðuni verður eisini viðgjørt um og hvussu, starvsfólkið hevur nátt málunum, ið sett vórðu í síðstu starvsfólkasamrøðu.
**Stk 3.** Útbúgving og annað menningarvirksemi fer vanliga fram í arbeiðstíðini. Arbeiðsgevarin rindar, jb. stk. 2, útreiðslur av útbúgving.
**Stk. 4.** Leiðsla og starvsfólk hava felags ábyrgd av, at menningarmálini verða rokkin. Leiðslan tryggjar karmar og treytir fyri førleikamenning, og starvsfólkið arbeiðir fram móti avtalaðu menningarmálunum.

**§ 5**. Almennur førleiki
Dagførdur grundleggjandi skúlakunnleiki kann verða treytin fyri at røkja og menna fakliga førleikan. Bæði einstaka arbeiðsplássið og einstaka starvsfólkið hava ábyrgd av at virka fyri, at almennur førleiki er partur av førleikamenningini.

**§ 6**. Leiklutur hjá leiðslu og starvsfólki
Leiðsla og starvsfólk skulu í felag, grundað á strategisku málini á arbeiðsplássunum og tørvinum á strategiskari førleikamenning
áseta grundreglur og leiðreglur fyri førleikamenningartiltøkunum á arbeiðsplássunum viðgera grundreglurnar fyri og tørvin á eftirútbúgving fyri allar starvsfólkabólkar áseta leiðreglur fyri, hvussu starvsfólkasamrøður skulu verða skipaðar
**Stk. 2.** Leiðsla og starvsfólk eftirmeta í felag eina ferð árliga førleikamenningartiltøkini á arbeiðsplássinum.
**Stk. 3.** Uppgávurnar í stk. 1 og 2 røkir samstarvsnevndin, um arbeiðsplássið hevur eina slíka. Biður annar parturin um tað, verður ein menningarnevnd vald undir samstarvsnevndini.

**§ 7**. Fylgibólkur
Ein fylgibólkur verður settur við umboðum fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og tey feløg, sum hava undirskrivað hesa avtalu.

**§ 8**. At seta í gildi og siga upp
Hendan avtala kann skrivliga verða søgd upp við 3 mánaða freist til ein 1. í mánaðinum, tó í fyrsta lagi tann 1. oktober 2019.

**Álitisfólkaskipan fyri heilushjálparar/heimahjálparar**
Á einum arbeiðsplássi, har 5 ella fleiri starvsfólk arbeiða, hava hesi starvsfólk rætt til at velja sær álitisfólk, ið verða vald fyri tvey ár í senn.
Fyri at kunna verða valdur sum álitisfólk, skal viðkomandi hava arbeitt í minsta lagi 1 ár.
Heilsuhjálparafelag Føroya skal góðkenna val av álitisfólki og tiltaksfólki, og hevur valið ikki gildi, fyri enn felagið hevur góðkent tað og boðað leiðsluni á avvarðandi arbeiðsplássi/øki frá.
**Stk. 2**. Álitisfólkini skulu eisini hava tiltaksfólk, ið verða vald á sama hátt sum álitisfólkið. Hesi skulu, tá álitisfólk hevur forfall, virka undir somu treytum og hava somu sømdir sum álitisfólkið.

**§ 2**
Álitisfólkið umboðar starvsfólkini í samskiftinum við leiðsluna og skal gera sítt til, at arbeiði fer siðiliga fram.
Leiðslan og álitisfólkið eiga í felag at fremja eitt gott samstarv. Álitisfólkið hevur skyldu at ansa eftir, at lógir, sáttmálar, fyriskipanir o.a., ið eru galdandi fyri arbeiðsplássið sum heild, verða yvirhildin, og skal virka fyri best møguligum samstarvi limanna og leiðslunnar millum.

**§ 3**
Álitisfólkið hevur rætt og skyldu til at tingast við leiðsluna um øll mál, sum hava týdning fyri starvsfólk og leiðslu. Er álitisfólkið ikki nøgt við avgerð leiðslunnar, skal tað leggja málið fyri felagið.

**§ 4**
Skyldur hjá álitisfólki skulu fremjast soleiðis, at tað sum minst tarnar arbeiðinum. Tá álitisfólk noyðast at fara úr arbeiði fyri at gera skyldur sínar, skal tað vera eftir avtalu við leiðsluna.
Í hesum føri, eins og tá leiðslan sendir álitisfólki boð um mál, ið hava við starvsfólk ella arbeiðsviðurskifti teirra at gera, skal álitisfólkið fáa ta vanligu lønina fyri ta tíð, tað er úr arbeiði.
**Stk. 2**. Álitisfólk fær tænastufrí við løn til at fara á skeið, ið fakfelag teirra ella leiðslan skipar fyri, so álitisfólkið fær møguleika at útbúgva seg í samráðingarkynstri, samstarvs- og talukynstri v.m.

**§ 5**
Álitisfólk kunnu bert verða søgd upp, eftir at arbeiðsgevarin frammanundan hevur lagt málið fram við grundgeving sínari fyri fakfelagið hjá álitisfólkinum.
**Stk. 2**. Uppsagnartíðin hjá álitisfólki er 6 mánaðir og verður longd við 3. mánaðum.

**§ 6**
Metir álitisfólkið ella fakfelag tess, at treytirnar fyri uppsøgnini ikki eru loknar, verður málið tikið til viðgerðar millum sáttmálapartarnar.
Við uppsøgnini skal fylgja holl skrivlig grundgeving fyri uppsøgnini. Henda grundgeving verður grundarlagið undir fundinum millum felagið og arbeiðsgevaran.
Verjan hjá álitisfólki heldur áfram í 2 ár aftaná, at tað er farið frá sum álitisfólk.
Rættindini í hesum stykki eru eisini galdandi fyri nevndarlimir.

**§ 7**
Um so er, at ivamál taka seg upp viðvíkjandi hesi skipan skal samráðing fara fram millum sáttmálapartarnar, leiðsluna og arbeiðsgevaran.
**Stk. 2.** Fæst ikki semja, verður málið at leggja fyri Fasta Gerðarrætt, vísandi til § 2, stk. 2. í sáttmálanum partanna millum.

**§ 8**
Um starvsfólk er valt í nevnd felagsins, skal starvsfólkinum verða givið heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini í givnum førum, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum og arbeiðsósemju.

**Stk. 2.** Nevndarlimir hava rætt til ein dag um mánaðin við løn til nevndararbeiði.
Tann, sum verður vald/ur til forkvinnu/formann í felagnum hevur altíð rætt til at fáa farloyvi uttan løn, og hevur stovnurin skyldu at hava starv til viðkomandi, tá formanstíðin er úti.

Tórshavn 14. mars 2019

Heilsuhjálparafelag Føroya | Kommunala Arbeiðsgevarafelagið